Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

betri trygging

# Hálvársfrásøgn 2025

Interim Report 1H 2025

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2



Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# Innihaldsyvirlit

Table of contents


**5 ára yvirlit** 4
Five year Summary

**01**

**Leiðslufrágreiðing** 6
Management Review

**02**

**Rakstrarroknskapur** 12
Income Statement

**Fíggjarstøða** 13
Balance Sheet

**Uppgerð av broyting í eginogn** 15
Statement of Changes in Equity

**03**

**Notur** 16
Notes

**Frágreiðing til lyklatølini** 20
Explanation of Key Figures

**04**

**Leiðsluátekning** 21
Statement by the Management

**Partafelagsupplýsingar** 23
Company Information

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

betri trygging

# 5 ára yvirlit / Five year summary

| DKK 1.000 | 1H 2025 | 1H 2024 | 1H 2023 | 1H 2022 | 1H 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur / Income Statement** | | | | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross written premiums | 279.443 | 268.951 | 247.325 | 231.594 | 218.028 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -194.482 | -254.000 | -153.682 | -142.352 | -105.851 |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi í alt / Total operational expenses | -39.362 | -39.817 | -36.380 | -34.803 | -31.988 |
| Úrslit av endurtrygging / Reinsurance result | -7.785 | 7.200 | -16.631 | -8.201 | -26.407 |
| Tryggingartekniskt úrslit / Technical result | 34.431 | -16.885 | 41.949 | 45.561 | 51.182 |
| Úrslit av íløguvirksemi aftaná rentu og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Total investment return after return on and value adjustement on technical provisions | 7.247 | 40.790 | 19.702 | -95.586 | 12.277 |
| Úrslit / Net result | 34.176 | 21.572 | 50.700 | -40.315 | 52.399 |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Result from net claims provisions | -21.879 | -24.497 | 12.609 | 4.636 | 8.281 |
| **Fíggjarstøða / Balance** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingaravtalur í alt / Total technical provisions | 569.989 | 526.259 | 482.332 | 615.557 | 650.974 |
| Tryggingaráogn í alt / Total technical assets | 50.883 | 25.814 | 42.649 | 160.005 | 171.012 |
| Eginogn í alt / Total Equity | 782.736 | 711.298 | 740.426 | 649.411 | 727.936 |
| Ognir í alt / Total assets | 1.405.440 | 1.276.942 | 1.254.335 | 1.338.095 | 1.413.299 |
| **Lyklatøl / Key ratios** | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 71,0 | 95,4 | 62,5 | 61,9 | 48,9 |
| Bruttokostnaðarprosent / Cost ratio | 14,4 | 15,0 | 14,8 | 15,1 | 14,8 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 2,8 | -2,7 | 6,8 | 3,6 | 12,2 |
| Combined ratio / Combined ratio | 88,2 | 107,6 | 84,1 | 80,6 | 75,8 |
| Operating ratio / Operating ratio | 87,5 | 106,3 | 83,1 | 80,3 | 76,2 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum / Relative run-off gains/losses | -5,5 | -10,1 | 4,4 | 1,5 | 2,4 |
| Eginognsavkast / Return on equity | 4,4 | 2,9 | 7,0 | -5,6 | 7,3 |
| Solvensdekningur / Solvency ratio | 281% | 265% | 320% | 313% | 278% |

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# Í stuttum / Highlights

**Úrslitið farna tíðarskeið**
**34 mió.kr.**

Net result
DKK 34 million

**Úrslitið áðrenn skatt**
**42 mió.kr.**

Result before tax
DKK 42 million

**Tryggingartekniskt úrslit**
**34 mió.kr.**

Technical result
DKK 34 million.

**Grundarfæfeingi**
**735 mió.kr.**

Base Capital
DKK 735 million.

**Solvensdekningur**
**281%**

Solvency Ratio
281%.

**Roknaður solvenstørvur**
**262 mió.kr.**

Solvency Capital requirement
DKK 262 million.

**Yvirdekningur í mun til individuellan solvenstørv**
**473 mió.kr.**

Excess relative to calculated
Solvency Capital Requirement
DKK 473 million.

**Úrslitið 2025 fyri skatt verður væntandi millum 40 og 70 mió.kr.**

Outlook for 2025 is expected to
be between DKK 40 and
70 million profit before tax.

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# 01

## Leiðslufrágreiðing

Management Review

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2



Betri Trygging P/F rekur skaðatryggingarvirksemi á føroyska marknaðinum, og veitir tryggingarvørur til privata og vinnuliga marknaðin, herundir til føroysku sjóvinnuna. Hugsjónin hjá felagnum er at skapa tryggleika, og málið er at vera fremsta og besta tryggingarfelag í Føroyum.

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Trygging P/F, og eigur allan partapeningin í felagnum.

## Tryggingargjøld

Tryggingargjøld fyri egna rokning í fyrra hálvári 2025 vóru 229,5 mió.kr. ímóti 222,4 mió.kr. fyrra hálvár 2024. Økingin stavar partvís frá prísvøkstri orsakað av inflatión. Gongdin í tryggingarinntøkum verður mett nøktandi.

## Skaðaendurgjøld

Skaðabøturnar fyri egna rokning í fyrra hálvári 2025 vóru 154,5 mió.kr. ímóti 202,1 mió.kr. fyrra hálvár 2024.

Í fyrra hálvári var felagið rakt av eini størri skaðahending. Veðrið háttaði sær væl og færri skaðar hava verið orsakað av vindi. Samlaða skaðatalið er tí eisini lægri í fyrra hálvári í ár.

## Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi

Bruttokostnaðarprosent var 14,4 í mun til 15,0 í 2024. Lága kostnaðarprosentið stavar í mestan mun frá neyvum eftirliti við rakstrarkostnaði og frá øktum tryggingargjøldum.

Rakstrarkostnaðirnir fyrra hálvár 2025 vóru 39,4 mió.kr. ímóti 39,8 mió.kr. fyrra hálvár 2024.

## Tryggingartekniskt úrslit

Tryggingartekniska úrslitið var 34,4 mió.kr. og er hetta 51,3 mió.kr betri enn fyri hálvárið 2024, tá úrslitið var -16,9 mió.kr. Orsøkin til hesa framgongd stavar í høvuðsheitum frá lækkaðum skaðaendurgjøldum og góðu gongdini annars. Færri stormskaðar hava verið fyrra hálvár 2025 samanborið við fyrra hálvár 2024.

Combined Ratio í fyrra hálvári 2025 var 88,2%, ið er væl lægri enn fyrra hálvár 2024.

Tryggingartekniska úrslitið kann sveiggja orsakað av stórum skaðahendingum, og tí verður úrslitið mett nøktandi.

## Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu

Íløguúrslitið varð 7,2 mió.kr. fyrra hálvár 2025 ímóti 40,8 mió. kr. fyrra hálvár 2024.

Felagið hevur hildið fast við íløgupolitikkin í fyrra hálvári, og íløgugongdin hevur verið nøktandi.

## Úrslit

Betri Trygging hevði eitt úrslit áðrenn skatt fyrra hálvár 2025 á 41,7 mió.kr., samanborið við 26,1 mió.kr. fyrra hálvár 2024.

Úrslitið áðrenn skatt stavar frá tryggingartekniskum úrsliti á 34,4 mió.kr. og íløguavkasti á 7,2 mió.kr.

Samlaða úrslitið í fyrra hálvári verður mett nøktandi.

## Kapitalur og solvensur

Eginogn felagsins tann 30. juni 2025 var 783 mió.kr. ímóti 769 mió.kr. tann 31. desember 2024.

Solvenskravið (individuella solvenskravið) var 262 mió.kr. tann 30. juni 2025.

Grundarfæfeingið við hálvárið 2025 var 735 mió.kr., og solvensdekningur felagsins var 281%.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok eru ongar týðandi hendingar, sum broyta metingina av hálvársfrásøgnini.

## Útlit og váðar í 2025

Úrslitið, tað ið eftir er av árinum, kann verða ávirkað av veðri, av einstøkum stórum skaðum, og annars av gongdini á bæði tryggingarmarknaðinum og fíggjarmarknaðum.

Gongdin í samfelagnum sæst aftur í hækkaðum tryggingarinntøkum. Væntandi heldur hendan gongdin á fram í seinnu hálvu av 2025.

Hóast óvissa er um skaðagongdina seinna hálvár, verður mett, at skaðaendurgjøld fyri egna rokning verða, sum væntað varð við ársbyrjan.

Kostnaðarstøði felagsins liggur við hálvárið nakað lægri, enn mett varð við ársbyrjan. Roknað verður kortini við, at kostnaðarstøðið, tá árið er runnið, verður sum mett við ársbyrjan.

Íløguúrslitið í seinna hálvári verður ávirkað av gongdini á altjóða fíggjarmarknaðunum og rentustøðinum. Av tí at felagið hevur valt ein varnan íløgupolitikk, er íløguúrslitið í nógvan mun tengt at gongdini í lánsbrøvum og rentustøðinum. Trupult er at meta um rentustøðið komandi hálvárið, men roknað verður við, at evropeiska stýringsrentan verður broytt tað, ið eftir er av árinum. Lækkar rentan, hevur hetta jalig árin á íløguúrslitið.

Metingin við ársbyrjan um útlitini fyri 2025 er óbroytt. Mett verður, at ársúrslitið fyri skatt í 2025 verður 40 til 70 mió.kr.

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# Summary

Betri Trygging P/F operates on the Faroese non-life insurances marked and offers insurance products within the Private, Commercial and Maritime segment. Our vision is to create safety to our customers, and we aim to be the best insurance company in the Faroe Islands.

The company is a subsidiary of Betri P/F and therefore a part of Betri P/F consolidated interim report.

Betri Trygging pre-tax result for H1 was 42 mDKK compared to 26 mDKK for the same period last year. As of the 30th of June 2025, the equity amounted to 783 mDKK and the balance sheet amounted to 1.405 mDKK.

Net insurance premiums were 229 mDKK compared to 222 mDKK the same period last year. This reflects partly price adjustments to offset inflation. The development in net insurance premiums is satisfying.

Net insurance claims for H1 2025 were 155 mDKK compared to 202 mDKK the same period last year. The decreased amount in claims is mainly due to no weather events in the first half of the year.

Total acquisition and administration costs were 39 mDKK compared to 40 mDKK in H1 2024. Cost ratio is 14.4.

The technical result for H1 was 34 mDKK compared to -16 mDKK the same period last year. Combined ratio for H1 2025 was 88.2 compared to 107.6 in 2024.

The technical result can be volatile and can be affected by larger claims. The result is considered satisfactory.

Investment result for H1 2025 was 7.2 mDKK compared to 40.8 mDKK the same period last year. The investment result for H1 is considered satisfactory.

No significant events have occurred after the 30th of June 2025 that affect the result for H1 2025.

The published outlook for 2025 can be affected by weather conditions, single large claims, and changes in the Faroese insurance market.

The investment activities for the rest of 2025 will be affected by the development in the global financial markets. Due to the conservative investment policy of Betri Trygging, the company is to a high degree exposed to the interest rate levels. Due to considerable global economic uncertainty, it is difficult to predict the interest rate levels in the foreseeable future.

The expectations for the second half of 2025 are that net insurance premiums will be about the same as in H1, net insurance claims will be as expected, and net operating costs will be somewhat higher than in H1. Overall expectations are that the result for H2 will be positive.

The net result for 2025 is considered to reach somewhere between 40 and 70 mDKK.

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# 02

## Roknskapur

Financial statement

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

betri trygging

# Rakstrarroknskapur / Income Statement

| DKK 1.000 | 1H 2025 | 1H 2024 |
|---|---|---|
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning / Premiums written net of reinsurance** | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross written premiums | 311.812 | 305.254 |
| Endurtryggingargjøld / Reinsurance premiums | -49.984 | -46.577 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in premiums provisions | -32.369 | -36.303 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Total premiums written net of reinsurance** | **229.459** | **222.374** |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Interest rate income from insurance activity** | **2.139** | **3.423** |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning / Compensation expenses net of reinsurance** | | |
| Útgoldnar veitingar / Claims paid | -170.659 | -222.374 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries received | 24.426 | 55.523 |
| Broyting í avsettum endurgjøldum / Change in claims provisions | -23.167 | -23.958 |
| Broyting í váðaískoyti / Change in risk margin | -656 | -7.668 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld / Change in reinsurance claims provisions | 15.552 | -3.643 |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt / Total compensation expenses net of reinsurance** | **-154.504** | **-202.120** |
| **Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum / Bonus and rebates** | **-5.522** | **-2.641** |
| **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning / Net operating expenses** | | |
| Útveganarkostnaður / Acquisition costs | -22.152 | -23.846 |
| Fyrisitingarkostnaður / Administration costs | -17.210 | -15.972 |
| **Útveganar- og fyrisitingarkostnaður í alt / Total acquisition and administration costs** | **-39.362** | **-39.817** |
| Provisjónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum / Commission and part of the result from reinsurance | 2.221 | 1.896 |
| **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi f.e.r. í alt / Total net operating expenses** | **-37.141** | **-37.921** |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **34.431** | **-16.885** |
| **Úrslit av íløguvirksemi/ Return on investment assets** | | |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. / Interest rate income and dividend etc | 14.676 | 12.378 |
| Virðisjavningar / Market value adjustments | -10.260 | 29.191 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi / Administration costs related to investment activity | 257 | 127 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments** | **4.673** | **41.697** |
| **Renta og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Return on and value adjustements of technical provisions** | **2.574** | **-907** |
| **Úrslit av íløguvirksemi aftaná rentu og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Total investment return after return on and value adjustement on technical provisions** | **7.247** | **40.790** |
| Aðrar inntøkur / Other income | 0 | 2.228 |
| **Úrslit áðrenn skatt / Result before tax** | **41.678** | **26.132** |
| Skattur / Tax | -7.502 | -4.560 |
| **Úrslit / Net result** | **34.176** | **21.572** |

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# Fíggjarstøða / Balance Sheet

| DKK 1.000 | 1H 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| **OGN / ASSETS** | | |
| **Materiell ogn / Tangible assets** | | |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 4.111 | 3.275 |
| Bygningar til egna nýtslu / Domicile properties | 93.578 | 94.430 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **97.689** | **97.705** |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir / Other financial investments** | | |
| Kapitalpartar / Shares | 288 | 265 |
| Íløguprógv / Investment funds | 416.569 | 388.050 |
| Lánsbrøv / Bonds | 770.594 | 727.535 |
| Innlán í kreditfeløgum / Deposits | 52.091 | 55.525 |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt / Total other financial investments** | **1.239.542** | **1.171.375** |
| **Íløguogn í alt / Total financial investments** | **1.239.542** | **1.171.375** |
| **Áogn / Outstanding accounts** | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum / Reinsurers' share of premium provisions | 1.122 | 1.122 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / Reinsurers' share of claims provisions | 49.761 | 34.370 |
| **Endurtryggjaranna partur av tryggingartekniskum avsetingum í alt / Total reinsurers' share of provisions for insurance contracts** | **50.883** | **35.491** |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 67 | 18.205 |
| **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables in connection with direct insurance contracts** | **67** | **18.205** |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 2.663 | 1.623 |
| Áogn hjá atknýttum feløgum / Receivables from affiliated companies | 10 | 0 |
| **Onnur áogn í alt / Total other receivables** | **2.673** | **1.623** |
| **Áogn í alt / Total receivables** | **53.623** | **55.319** |
| **Onnur ogn / Other assets** | | |
| Útsett skattaogn / Deferred tax surplus | 768 | 768 |
| **Onnur ogn í alt / Total other assets** | **768** | **768** |
| **Tíðaravmarkingar / Accrued income** | | |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 4.270 | 5.927 |
| Aðrar tíðaravmarkingar / Other accrued income | 9.548 | 10.845 |
| **Tíðaravmarkingar í alt / Total accrued income** | **13.817** | **16.772** |
| **OGN Í ALT / TOTAL ASSETS** | **1.405.440** | **1.341.940** |

betri trygging

# Fíggjarstøða / Balance Sheet

| DKK 1.000 | 1H 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| **SKYLDUR / LIABILITIES** | | |
| **Eginogn / Equity** | | |
| Partapeningur / Share capital | 400.000 | 400.000 |
| Flutt úrslit / Retained earnings | 382.736 | 348.560 |
| Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividend | 0 | 20.000 |
| **Eginogn í alt / Total equity** | **782.736** | **768.560** |
| **Avsetingar til tryggingaravtalur / Technical provisions** | | |
| Avsett tryggingargjøld / Premium provisions | 123.818 | 92.254 |
| Avsett til endurgjøld / Claims provisions | 415.678 | 395.364 |
| Váðaískoyti á skaðatryggingaravtalum / Risk margin provisions | 23.861 | 23.204 |
| Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum / Bonus and discount provisions | 6.631 | 12.249 |
| **Avsetingar til tryggingaravtalur í alt / Total technical provisions** | **569.989** | **523.071** |
| **Avsettar skyldur / Other Provisions** | | |
| Eftirlønir og tílíkar skyldur / Pensions and similar obligations | 1.611 | 1.611 |
| **Avsetingar í alt / Total provisions** | **1.611** | **1.611** |
| **Skuld / Debt** | | |
| Skuld í sambandi við beinleiðis trygging / Debt related to direct insurance | 1.488 | 2.553 |
| Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 9.133 | 13.520 |
| Skuld til atknýtt feløg / Debt to affiliated companies | 0 | 902 |
| Beinleiðis skattur / Current tax liabilities | 24.346 | 16.844 |
| Onnur skuld / Other | 16.137 | 14.879 |
| **Skuld í alt / Total debt** | **51.104** | **48.697** |
| **SKYLDUR Í ALT / TOTAL LIABILITIES** | **1.405.440** | **1.341.940** |

Nota 1 Nýttur roknskaparháttur / Significant accounting policies

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity

| DKK 1.000 | Partapeningur / Share capital | Flutt úrslit / Retained earnings | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividend | Eginogn / Equity |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2024 / Shareholder's equity at January 1, 2024** | **400.000** | **289.726** | **84.375** | **774.101** |
| Rørslur á eginognini í 2024 / Movements on equity in 2024 | | | -84.375 | -84.375 |
| Ársúrslit / Net result | | 58.834 | 20.000 | 78.834 |
| **Eginogn 31. desember 2024 / Shareholders' equity at December 31, 2024** | **400.000** | **348.560** | **20.000** | **768.560** |
| | | | | |
| **Eginogn 1. januar 2025 / Shareholder's equity at January 1, 2025** | **400.000** | **348.560** | **20.000** | **768.560** |
| Rørslur á eginognini í 2025 / Movements on equity in 2025 | | | -20.000 | -20.000 |
| Úrslit / Net result | | 34.176 | | 34.176 |
| **Eginogn 30. juni 2025 / Shareholders' equity at June 30, 2025** | **400.000** | **382.736** | **0** | **782.736** |

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# 03

## Notur

Notes

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2



Nota

**1 Nýttur roknskaparháttur / Significant accounting policies**

# Alment

Hálvársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 4).

Frásøgnin er eisini sett upp á enskum. Skuldi tað hent, at tað er ósamsvar millum føroysku útgávuna og ensku útgávuna, hevur føroyska útgávan forrættindi.

Hálvársroknskapurin verður vístur í donskum krónum. Øll onnur gjaldoyru verða mett sum fremmant gjaldoyra.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

## Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognsuppgerð og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt sær, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og samløguna av teimum einstøku tølunum.

## Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi. Fíggjarlig amboð verða innroknað samsvarandi hesum og verða tikin við í ársfrásøgnina á handilsdegnum.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast álítandi upp.

Fíggjarlig amboð verða innroknað á handilsdegnum, og innrokningin steðgar, tá rætturin at móttaka ella lata pengar frá fíggjarliga amboðnum fer úr gildi ella um fíggjarliga amboðið verður avhendað soleiðis, at váðin og rættindini til vinning í sambandi við ognarrættin í høvuðsheitum eru flutt til annan eigara.

Tá ið ognir ella skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna á fyrsta sinni, verður hetta gjørt til dagsvirði. Tó verða óítøkiligar og ítøkiligar ognir á fyrsta sinni ásettar til útveganarvirði. Eftir hetta verða ognir og skyldur uppgjørdar sum lýst fyri hvønn roknskaparpost sær niðanfyri.

# Generally

The H1 interim report has been rendered in accordance with the regulations and meets the requirements stipulated by the Faroe Insurance Act. The report has been rendered in accordance with Degree no. 4 of the 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies (henceforth Decree no. 4).

The financial statements are also available in English. In the event of any discrepancy between the Faroese and the English version, the Faroese version shall prevail.

The H1 interim report is presented in DKK. All other currencies are considered as foreign currency.

The H1 Interim Report has not been audited.

## Rounding of figures

The figures in the income statement, the balance and the notes are rounded off. Because the figures are rounded off separately, the rounded figures may add up differently than the underlying figures.

## Inclusion and valuation in the annual report

Assets are included in the balance sheet when it is likely that the company will derive future financial profit from them, and the asset value can be reliably assessed. Financial instruments are included according to this and are included in the annual report on the day of transaction.

Liabilities are included in the balance sheet when it is likely that the company will lose financial profit and the size of the liability can be reliably assessed.

Financial instruments are recognized at the date of settlement, and the recognition ceases when the right to receive or deliver cash flows from the financial instrument has expired, or if the financial instrument has been transferred, and the company has essentially transferred all risks and returns associated with the ownership.

Assets and liabilities are initially shown at fair value. However intangible and tangible assets at initial recognition are measured at cost. Subsequently, assets and liabilities are stated as described below for each entry individually.

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið til upplýsingar um vinning, tap og váðar, ið koma til okkara kunnleika fram til dagin, tá hálvársroknskapurin verður lagdur fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru fíggjarstøðudagin.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, harundir virðisjavning av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar, broyting í avsetingum og av- og niðurskrivingar – sum er við til at røkka ársins inntøku.

Recognition and measurement take into account gains, losses and risks, which occurred prior to the presentation date of the Annual Report and which confirm or disprove conditions, which existed on the balance sheet date.

Income is entered in the profit and loss account as it is gained, this includes market value adjustments. Expenses involved in gaining the income of the year are included in the profit and loss account, including claims, changes in provisions and depreciations and amortisations.

## Konsernviðurskiftir og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslugrundaðum støði.

## Group relations and affiliated parties

Trade and services between companies within the group will be handled at market price or at a level meeting expenses.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virðið av ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum. Avseting til skaðaendurgjald er tann roknskaparposturin, sum í størstan mun er tengdur at roknskaparligum metingum.

## Accounting estimates

Determining the carrying value of certain assets and liabilities is associated with an estimate of how future events will affect the value of these assets and liabilities. Mostly determined by accounting estimates are liabilities under Provisions for outstanding claims.

## Dagsvirðið av heimbýlisbygningum

Við máting av dagsvirðinum av bygningum verður eitt avkastbaserað modell nýtt. Dagsvirðið á bygningum er grundað á eina afturdiskontering av framtíðar rakstri við individuelt ásettum avkastkrøvum. Avkastkravið er ásett við støði í staðnum har bygningurin er, møgulig nýtsla og í mun til hvussu bygningurin er viðlíkahildin, hvørjum standi hann er í o.s.fr.

## Fair value of domicile properties

To measure the fair value of properties an asset return model is used. The fair value on properties determined based on the calculated return on operations and the individually determined rate of return. The return rate is fixed on the basis on the location of the individual property, potential use, the state of maintenance, quality etc.

## Útlendskt gjaldoyra

Flytingar í fremmandum gjaldoyra verða við fyrstu innrokning umroknaðar til kursin á flytingardegnum.

Ágóði, skyldur og aðrar gjaldoyraligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru avroknaðar uppgerðardagin, verða roknaðar við tí endakursi, sum er galdandi uppgerðardagin.

Gjaldoyramunir, ið standast millum kursin handilsdagin og uppgerðardagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum 'Kursjavningar'.

## Foreign Currency Translation

Transactions in foreign currencies are translated at transaction date.

Receivables, payables, and other monetary items denominated in foreign currencies, not translated at the balance sheet date, are translated at the closing price at balance sheet date.

Gains and losses arising between the exchange rate at the settlement date are recognized in the income statement 'Exchange rate adjustments'.

## Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 4 frá Tryggingareftirlitinum. Víst verður til brotið "Frágreiðing til lyklatølini" á síðu 20.

## Key figures

These are rendered in accordance with Executive order no. 4 of 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies. Explanation of Key Figures is shown on page 20.

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2



# Frágreiðing til lyklatølini / Explanation of Key figures

### Solvensur og kapitalur

| | | |
|---|---|---|
| Bruttoendurgjaldsprosent | = | – Bruttoskaðaendurgjøld x 100 / ( Bruttotryggingargjøld – Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Bruttokostnaðarprosent | = | Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt x 100 / ( Bruttotryggingargjøld – Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Nettoendurtryggingarprosent | = | Úrslit av endurtrygging x 100 / ( Bruttotryggingargjøld – Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Combined ratio | = | – ( Bruttoskaðaendurgjøld + Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt + Úrslit av endurtrygging ) x 100 / ( Bruttotryggingargjøld – Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Operating ratio | = | – ( Bruttoskaðaendurgjøld + Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt + Úrslit av endurtrygging ) x 100 / ( Bruttotryggingargjøld – Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum + Rentu av tryggingarvirksemi ) |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum | = | – Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Netto skaðatiltak við ársbyrjan |
| Eginognsavkast | = | Rakstrarúrslit x 100 / Eginogn (miðal) |
| Solvensdekningur | = | Grundarfæfeingi / Fæfeingiskrav |

### Solvency and capital ratios

| | | |
|---|---|---|
| Claim ratio | = | – Gross insurance claims x 100 / ( Gross written premiums – Bonus and rebates ) |
| Cost ratio | = | Total acquisition and administration costs x 100 / ( Gross written premiums – Bonus and rebates ) |
| Net reinsurance percent | = | Result of reinsurance x 100 / ( Gross written premiums – Bonus and rebates ) |
| Combined ratio | = | – ( Gross insurance claims + Total acquisition and administration costs + Result of reinsurance ) x 100 / ( Gross written premiums – Bonus and rebates ) |
| Operating ratio | = | – ( Gross insurance claims + Total acquisition and administration costs + Result of reinsurance ) x 100 / ( Gross written premiums – Bonus and rebates + Interest rate income from insurance activity ) |
| Relative effect on provisions | = | – Result from net claims provisions / Net claims provision at 1 January |
| Return on equity | = | Result for the year x 100 / Equity (average) |
| Solvency ratio | = | Capital base / Solvency capital requirement |

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# 04

## Átekningar

Statements

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2



# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2025 hjá Betri Trygging P/F.

Hálvársroknskapurin og leiðslufrágreiðingin eru sett upp samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 30. juni 2025, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 30. juni 2025.

Tað er okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin gevur eina rættvísandi umrøðu av gongdini í virkseminum hjá Betri Trygging P/F og fíggjarligu støðuni, umframt eina rættvísandi lýsing av teimum týðandi váðunum og óvissu táttunum, sum felagið kann ávirkast av.

# Statement by the Management

As of today, the Board and Management have reviewed and approved the interim report 1H 2025 for Betri Trygging P/F.

The interim report has been rendered in accordance with the Faroese Insurance Act.

It is our opinion that the financial statement gives a true and fair view of the company's assets, liabilities, and financial position at 30 June 2025 and of the results of the company's operations for the period 1 January – 30 June 2025.

In addition, we also consider the Management's review to give a fair presentation of the development in the company's activities and the company's financial position as a whole, as well as a description of the significant risks and elements of uncertainty that may affect the company.

**Betri Trygging P/F**
Tórshavn, 18. september 2025

## Stjórn / Executive Board

Ingunn Eiriksdóttir

**Ingunn Ósk Eiriksdóttir**
Forstjóri / CEO

## Nevnd / Board of Directors

Lars Bonde
**Lars Bonde**
Nevndarformaður / Chairman

Evy Jacobina Jacobsen
**Evy J. Jacobsen**
Næstforkvinna / Deputy Chairwoman

Jens Hjørleif Hansen
Jens Hjørleif Hansen*

Marjun Thomsen
Marjun Thomsen*

Mimi Steintórsdóttir
Mimi Steintórsdóttir

Mortan Joensen
Mortan Joensen*

Poula Michelsen
Poula Michelsen

Teitur Samuelsen
Teitur Samuelsen

*Starvsfólkavalt umboð / *Employee Representative

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

# Partafelagsupplýsingar / Company Information

## Felagið / Company

Betri Trygging P/F
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO 110  Tórshavn
Tel +298 348600
betri@trygging.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. 3691 / Company no. 3691
Roknskaparár 23 / Annual Year 23

## Nevnd / Board of Directors

Lars Bonde, nevndarformaður / Chairman
Evy J. Jacobsen, næstforkvinna/ Deputy Chairwoman
Jens Hjørleif Hansen *
Marjun Thomsen *
Mimi Steintórsdóttir
Mortan Joensen *
Poula Michelsen
Teitur Samuelsen

* Starvsfólkavalt umboð / * Employee Representative

## Stjórn / Executive Board

Ingunn Ósk Eiriksdóttir, forstjóri / CEO

## Grannskoðan / Auditors

Januar, løggilt grannskoðanarvirki P/F
PriceWaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
Innanhýsis grannskoðanin í Betri samtakinum

Docusign Envelope ID: B04A07DF-9DA2-43A1-804B-C0CC339D7DD2

betri trygging